

*– Hetta var mítt triðja, so tað er nokk lítil ivi um, at tað eri eg, sum eigi at skjóta, tá vit næstu ferð fáa møguleikan, heldur Høgni Zachariasen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Dagsins fuglfirðingur

**Lagið á toppskjúttanum hjá ÍF var í topp, tá tað eftir dystin kundi staðfestast, at frísparksmálið hjá honum eftir øllum at døma hevur tryggjaði ÍF ein eyka møguleika í deildini**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Hann hevur gjørt tað oftani áður, men hóast hetta, so ásannaði Høgni Zacharisen, at trýstið undan málgevandi sparkinum móti B36 var størri, enn tað so oftani áður hevur verið.

– Sjálvandi hugsar tú um tað. Har stóð jú heilt nógv upp á spæl, og vit skuldu hava stig burtur úr dystinum.

– Og so var tað eisini tað, at Magni (á Lakjuni, blðm.) og eg hava havt eina lítla innanhýsis kapping um fríspørk. Hann hevði jú skotið eitt fyri steðgin, so hesaferð var tað mítt tørn, og tað spældi so tíbetur væl av. Eisini hóast fleiri eftir dystin hildu fast um, at nógvi vindurin gjørdi sítt, men tað passar ikki. Stormurin byrjaði ikki av álvara fyrr enn allar seinastu løtuna av dystinum, og tá hevði eg longu skorað!

Í tí kappingini tykist tað annars mest sum avgjørt, at Høgni verður tann ovari av teimum. Í øllum førum, um tað er Høgni sjálvur, sum stendur fyri roknskaparhaldinum.

– Magni pástendur, at hann hevur skotið tvey beinleiðis fríspark í mál, men eg haldi hann lýgur. Mær vitandi er tað bara eitt, og hetta var mítt triðja, so tað er nokk lítil ivi um, at tað eri eg, sum eigi at skjóta, tá vit næstu ferð fáa møguleikan, heldur hann.

### Einki er avgjørt

Í skrivandi løtu sigur stigatalvan, at ÍF nú er fýra stig undan B68, so tað kann meira enn so hugsast, at júst hetta seinasta frísparksmálið frá Høgna var tað, sum bjargaði árinum í Fuglafirði.

Men sjálvur vil toppskjútti hjá ÍF so ikki taka nakað fyri givið.

– Teir hava so framvegis seks stig eftir at spæla um, og fáa teir fýra av hesum, so eru teir ájavnir okkum í stigum. Og innanhýsis eru teir eisini betri, so vit taka einki fyri givið, sigur hann, áðrenn hann leggur afturat, at fuglfirðingar sjálvandi eisini sjálvir hava møguleikan at vinna í Klaksvík á seinasta degi, og harvið avgera alt.

– Men tá tað er sagt, so sær tað sjálvandi eisini hampuliga gott út hjá okkum nú. Vit hava í øllum førum lagt trýst á B68 undan teirra dysti mánakvøldið, og hartil skal B36 nú helst vinna á B68 í seinasta umfarinum fyri at ogna sær silvurið, so jú. Tað sær betri út.

### Máttu stríðast

Fuglfirðingarnir mundu annars ikki halda sjálvir, at tað stóð nakað serligt til, eftir at teir fyri viku síðani taptu á Svangaskarði.

Síðani tá hevur nógv orka verið løgd í sálarligu løðingina til dystin móti B36, og tað skuldi eisini vísa seg, at tørvur var á hesum. Ikki minst, tí B36 eftir bara átta minuttum snaraði 1-0 til 1-2.

– Vit tosaðu um tað í steðginum, og niðurstøðan var greið. Har var einki annað hjá okkum at gera, enn at stríðast av allari megi. Vit máttu og skuldu hava stig burturúr dystinum, og tað fingu vit so tíbetur eisini, staðfesti dagsins maður í fuglafirði at enda.

ÍF-B36 2-2 (1-2):

# Høgni bjargaði ÍF

**Við einum dreymamáli upp á beinleiðis fríspark sendi Høgni Zachariassen ÍF eitt sera langt fet móti framhaldandi tilveru í bestu deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Fyri tað nógva var álopsspælið hjá ÍF hugflogsfátækt, og hóast Sylla royndi, so hevði hann fyri tað mesta trong kor í B36-verjuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Enn eru ikki allar súður syftar, men tað er nógv, sum bendir á, at Høgni Zachariasen tryggjaði ÍF framhaldandi lív í bestu deildini.

Sparkiteknikkurin er longu vælkendur, og tað er so langt ífrá fyrstu ferð í ár, at hann hevur sent fríspark beinleiðis í kassan. Men trýstið hesaferð mundi tó kennast nakað væl størri, enn tað annars hevur gjørt. Men hetta nervaði ikki fuglfirðingin. Hart – men tó berherskað - sendi hann upp um múrin og dygst úti við stólpan, uttan at B36-málverjin hevði nakran møguleika at verja fyri, og so stóð 2-2 á talvuni. ÍF lá til at fáa stig, og so bendir alt á, at bjargingin er vís.

### Øgilig byrjan

Tað var annars fyrstu fáu minuttirnar, at tað nógva av undirhaldinum gekk fyri seg í Fuglafirði sunnudagin.

Dysturin var ikki meira enn tríggjar minuttir gamal, tá Sylla sýndi heimaáskoðarunum, at tað kanska ikki fór at gerast heilt ógjørligt at bjarga tilveruni í deildini. Staddur nakað til vinstru fekk hann bæði pláss og tíð at reka inn í B36-brotsteigin, og við einum bleytum skoti sendi hann ÍF á odda.

B36 ætlaði tó ikki at leggja seg niður fyri tað. Teir vóru komnir eftir silvurmerkjunum, og eftir bara átta minuttum gjørdu teir sær tvær ferðir dælt av, at ÍF verjan ikki var nóg avgjørd. Fyrst slapp ein bóltur at detta niður í tómrúminum millum verju og málverja, og tá eingin vildi gera nakað við henda, tók Egil á Bø av.

Og lítla løtu seinni kundi hálvi fugfirðingurin, John Petersen, senda B36 á sigurskós, tá hann fekk góðar stundir at temja innlegg úr høgru, áðrenn hann sendi bóltin í netið.

### Hugflogsleyst

Soleiðis kom dysturin fyri tað nógva at líkjast fleiri øðrum dystum, sum ÍF hevur leikt í ár. Teir vórðu noyddir at satsa niðaneftir, og so kundi mótstøðan spæla upp á kontra.

Tað tóktist heldur ikki, sum var nakað serligt bit í álopsspælinum hjá ÍF. Serstakliga tí teir í ovurstóran mun royndu at satsa upp á gjøgnumbrotsstyrkina hjá Sylla, men eisini hann mátti ásanna, at tá tað ræður um mann-mótimanni støður, eru fáir verjuleikarar í landinum, sum eru stinnari enn Pól Thorsteinsson.

Hinvegin var B36 heldur ikki so øgiliga vandamikið í kontraspælinum. Alt ov sjáldan varð spælt nóg beinleiðis í rúmið, sum álopsleikararnir fingu, men heldur beint niðan í høvdið á nýklækta pápanum í ÍF-verjuni, Bartal Eliasen. Og tá miðvøllinum so av og á kom til hugsa at spæla djúpt, gjørdist talan aloftast um ov djúpar sendingar, sum sluppu at ferðast heilt oman til Karstin í ÍF-málinum.

Næst við vóru teir um miðjan seinna hálvleik, tá John Petersen endaði álop við at skjóta á stólpan.

Men fuglfirðingarnir góvust ikki. Ivaleyst mundu teir fullvæl vita, at vónin um bjarging stóð og fall við, hvørt teir fingu nakað burturúr hesum dystinum, og eitt korter fyri leiklok kom so úrslitið. Fríspark úr 20 metrum og bang. Javnleikurin hekk í loftinum, og um nakað, so mundu fuglfirðingarnir vera nærri við at vissa sær øll stigini enn B36, men meira enn tað sama gjørdist ikki.

### Bjargingin nærum víst

Og so kundu tey í fuglafirði leggja vertin á regnið, sum fyri tað mesta hevði oyst niður, og á vindin, sum seinastu løtuna gjørdu eina og hvørja roynd at spæla skipaðan fótbólt vónleysa. Teir eru nú fýra stig undan B68, og sum um tað ikki var nóg mikið, so syrgdu fuglfirðingarnir eisini fyri, at B36 helst skal vinna seinasta dystin móti B68, um teir skulu vissa sær silvurið.

## FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-B36 2-2 (1-2)**
1-0: Ahmed D. Sylla, 3
1-1: Egil á Bø, 4
1-2: John Petersen,11
2-2: Høgni Zachariasen, 77
**ÍF:** Karstin Joensen – Áki R. Petersen, Bartal Eliasen, Viggo Johannesen, Rúni Elttør – Eyðolvur R. Petersen, Høgni Zachariasen, Høgni Madsen, Gunnar G. Nielsen – Ahmed D. Sylla, Magni á Lakjuni
**B36:** Magnus E. Poulsen – Arnbjørn Danielsen, Pól Thorsteinsson, Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre – Alex dos Santos, Jens Kritsian Hansen, Klæmint Matras, Bergur Midjord
**Dómari:** Páll Augustinussen: Tóktist í fleiri førum beinleiðis ivasamur. Ikki minst, tí ófantaligar tacklingar í fleiri førum sluppu at fara framvið púrasta óátalaðar.



VB-KÍ 2-0 (1-0):

# Bronsan hvarv í vindinum

**Vágbingar skoraðu bæði undan og móti nógva vindinum, og harvið punkteraðu teir dreymarnar hjá klaksvíkingum um at vinna heiðursmerkir**

VB-KÍ
*Jóannes Hansen*



*Veðrið var av tí allar ringasta í Vági, men tá klaksvíkingarnir nú vóru komnir suður, so vildu teir hava dystin avgreiddan*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Góða gongdin seinastu vikurnar hevur hildið lív í dreyminum hjá klaksvíkingum um, at tað — hóast tað leingi gekk av skriðuni — skuldi eydnast at fáa heiðursmerkir, nú teir júst eru farnir um tey hundrað.

Sunnudagin hvarv vónin um, at dreymurin skal gerast til veruleika. KÍ var í Vági, og har eydnaðist tað heimaliðnum at vinna triðja heimasigurin síðani summarsteðgin og fjórða heimasigurin í hesum kappingarárinum.

### Illveðursdystur

Líkindini vóru út av lagi vánalig at spæla fótbólt í. Vindurin var heilt nógvur, og Vágseiði lá undir í sjóroki. Undan dystarbyrjan varð møguleikin at útseta nevndur og kanska at spæla mánakvøldið. Men serliga klaksvíkingar settu uppá, at dysturin skuldi avgreiðast.

Undir sovornum líkindum var tað eingin møguleiki at fáa rættuligt fótbóltsspæl í lag. VB hevði nógva vindin undan í fyrra umfarinum. Tá fingu teir eitt mál, og teir høvdu góðar møguleikar at fáa fleiri.

Mindaugas hevði tveir góðar møguleikar, tá ið hann varð einsamallur. Í øðrum førinum eydnaðist honum at senda framvið unga KÍ málverjanum, Mathiasi Samuelsen, men Niclas Niclassen fekk beint burtur á strikuni. Og í hinum førinum fekk Mindaugas gult kort burturúr, tá ið hann í leysari støðu fór framvið málverjanum og fór um koll. Í staðin fyri brotssparki bríkslaði Petur Reinert, sum eftir útbúgving á flatlondum er komin aftur á klettarnar og aftur er farin at døma, fyri frísparki til KÍ.

Einasta málið í 1. hálvleiki skrásettidómarin sum sjálvmál. Úr eitt sindur til høgru og einar tjúgu metrar úr málinum sendi Milan Kulic flatt fríspark móti KÍ málinum. Dómarin hevði armin á lofti, tí talan var um óbeinleiðis fríspark, sum dómarin hevði dømt fyri vandamikið spæl. Um bólturin hevði farið í málið, uttan at nakar hevði nortið við hann, so hevði dómarin havt dømt málspark. Men ungi KÍ málverjin mundi ikki hava fatað støðuna rætt. Hann tveitti seg eftir bóltinum og fekk fatur á honum, men hann var so óheppin at missa hann inn um strikuna, og so var mál.

Tá ið seinna umfarið var bara fimm minuttir gamalt, misti VB ein mann. Mindaugas gjørdist einsamallur, men KÍ málverjin bjargaði. Tá ið hann so misti bóltin aftur, royndi Mindaugas at fáa fatur á aftur, men hann rakti málverjan í armin. Dómarin bríkslaði fyri frísparki, og tá ið onkrir av klaksvíkingunum vóru í nánd av VB álopsmanninum, skumpaði hann ein um koll, og so var einki annað hjá dómaranum at gera enn at fara í reyvalumman.

Men tað bilti ikki hjá VB, at teir vóru undirmannaðir. Jón Pauli Olsen, sum var á sentrala miðvøllinum saman við Milan Kulic, gekk undan, og hóast tað ikki bar til at fáa stórvegis av skipaðum spæli í lag, so var VB omaná. Teir dugdu ímóti vindinum at leggja bóltar framum um KÍ verjuna, og í einum sovornum snarálopi fingu teir mál. Símun Samuelsen gjørdist leysur eitt sindur til vinstru, og hann setti framvið KÍ málverjanum.

### Tamir í saltinum

Klaksvíkingar vóru rættuliga tamir. Teir á heimaliðnum vóru ágrýtnari, teir vunnu flestu nærdystirnar, og teir vóru fyrri á flestu returbóltunum. Tað er ikki minst týdningarmikið, tá ið líkindini vóru, sum tey vóru hesa ferð.

Klaksvíkingar høvdu kortini sínar møguleikar, men teir fingu einki burturúr. Besta møguleikan í 1. hálvleiki hevði Atli Danielsen, tá ið hann eftir hornaspark royndi seg við stútara. Men Poul N. Poulsen bjargaði á málstrikuni.

Í 2. hálvleiki var besti KÍ møguleikin, tá ið Arnhold Joensen sendi framvið Bjarna Johansen, men bólturin streyk framvið skeivu megin stólparótina.

Á dómaraseðlinum er ikki viðmerkt, nær útskiftingarnar vórðu framdar. Tað vóru ikki líkindi at skriva, skilja vit á lagnum!

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-KÍ 2-0 (1-0)**
1-0: sjálvmál 13.
2-0: Símun Samuelsen 68.
**Dómari:** Petur Reinert
**VB:** Bjarni Johansen - Jákup Olsen, Anders Sørensen, Eyðun Jacobsen, Kári í Lágabø - Dan Djurhuus (Eyðstein í Lágabø), Milan Kulic, Jón Pauli Olsen (Elian Hansen), Símun Samuelsen - Mindaugas, Poul N. Poulsen (Jón Poulsen)
**Gult kort:** Mindaugas
**Reytt kort:** Mindaugas 50. (tvey gul)
**KÍ:** Mathias Samuelsen - Leon Bjartalíð (Tórður Lervig), Jan Andreasen, Niclas Niclassen, Símun Joensen - Arnhold Joensen (Kristian á Lakjuni), Jan Joensen, Atli Danielsen, Eyðun Klakstein (Frank Joensen) - Erling Fles, Jacob Bymar
**Gult kort:** Jan Andreasen, Eyðun Klakstein, Leon Bjartalíð

# Hvalbingar skúgvaðu alla mótstøðu til viks

**Royn hevur aftur í ár vunnið kappingina í fimtu deild**

FÓTBÓLTUR 5. DEILD
sportal.fo

Hvalbingar tryggjaðu sær leygardagin gullið í 5. deild í fótbólti.

Finalan var á Svemýri á Tvøroyri ímóti VB.

Líkindini at spæla vóru einki serlig, men tað tóktist ikki at nerva spælararnar, serliga ikki hvalbingar, ið vóru tað betra liðið, tá ið samanumkom.

Men tað var VB, sum legði betri fyri, tá ið Arthur Tausen legði vágbingar á odda í einum jøvnum, men spennandi fyrra hálvleiki. Hanus Toftheyggj svaraði aftur fyri Royn, so hálvleikstøðan var 1-1.

Í seinna hálvleiki var Royn klárt betra liðið og gamli málrevurin, Vilmund Michelsen, legði tíðliga Royn framum 2-1.

Samanspælið hjá Royn gekk nógv betri enn hjá VB og miðskeiðis í hálvleikinum beindi Ingi Mortensen allan iva burtur, tá ið hann við einum hegnisligum skotið lyfti bóltin upp um VB- málverjan og í málið og legði Royn á odda 3-1, sum eisini gjørdust endaliga úrslitið.

Tað nærmasta, VB var við at koma aftur í dystin, var tá ið teir høvdu eitt dundurskot á yvirliggjaran í tí nógva undanvindinum. Eftir dystin handaði Óli Holm, FSF. forseti Roynspælarunum gull-heiðursmerkini og ferðasteypið, sum Royn eisini vann í fjør.



*Royn varð samansett av eldri, royndum og garvaðum spælarum og yngri kvikum spælarum Tað var ein góð blanding, tí ta tryggjaði teimum gullmerkini í 5. deild*

*Mynd: Áki Bertholdsen*